# Dreymurin gjørdist veruleiki



*Boris Becker var til staðar í Monako fyri at handa landsmanni sínum Michael Schumacher virðislønina fyri besta ítróttarligar avrik hjá einum mannfólki fyri 2001. Heidi Andreasen fekk eisini møguleikan at taka eina mynd av sær saman við Boris Becker.*



*Víðagitni rennarin Edwin Moses sat í nevndini, ið velur úr, hvør skal vinna Laureus World Sports Awards. Her er hann avmyndaður við Heidi.*



*Heidi fekk ein kjóla seymaðan serliga til sín og hennara serliga kvøld.*



*Heidi saman við vinnaranum av kappingini, Esther Fergeer, ið spælir tennis í koyristóli.*



*Tað var ógvuliga stórsligið, tá virðislønirnar vórðu handaðar.*



*Kendi sjónleikarin Eriq La Salle var við í tyrluni, ið Heidi og Katrin fóru við av gistingarhúsinum til flogvøllinum. Eriq La Salle er serliga kendur úr sjónvarpsrøðini ER(Skadestuen).*

**Dreymur varð til veruleika, tá Heidi Andreasen vitjaði í Monako, tí hon var innstillað til at vinna heiðurin sum heimsins besta ítróttarfólk. Í fýra dagar vóru tey vartaði upp sum greivar og borin á lógvum í einum landi, ið er fyri tey ríkastu ríku. Einki varð spart, og Heidi var mitt í verðini, tá hon ferðaðist millum kongalig og heimskend ítróttarfólk í kappingini um at gerast heimsins besta**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*

–Tey bóðu meg um endiliga at nýta hetta upplivilsið, og tað gjørdi eg eisini. Eg nýtti tað hundrað prosent.

Orðini eigur Heidi Andreasen. Sekstan ára gamla eiðisgentan var fyri góðari viku síðani í Monako og savnaði sær minnir, ið best kunnu kallast dreymar fyri onnur, men fyri hana gjørdist tað veruleiki. Hon var í fýra dagar mitt í verðini í ríkamannalandinum Monako, har hon var innstillað til at gerast ársins og heimsins besta ítróttarfólk. Tað gjørdist ein uppliving fyri lívið fyri Heidi, ið frá byrjan til enda varð borin á lógvum, og einki varð spart fyri at gera hennara uppliving til nakað serligt.

Í einum landi, har einans rey ríkastu ríku sleppa at búgva kundi Heidi Andreasen ferðast og gera dreym til veruleika. Í fýra dagar við einans reinum luksus gjørdist hon ein dreym fátækari, men eina stóra uppliving ríkari. Tað rakk ikki til sigur, men upplivingin skuggaði alt annað.

## Innstillað

Alt byrjar við, at Heidi Andreasen í februar mánað fær at vita, at hon er innstillað til eina virðisløn. Virðislønin, ið hon er innstillað til, er partur av tiltakinum Laureus World Sports Awards. Talan er um nakrar viðurkendar virðislønir, ið ítróttafólk meta sum ein tignarligan heiður at fáa. Nevnast kann m.a., at ársins ítróttarfólk hjá monnum hesaferð gjørdist týski Formel 1 koyrarin Michael Schumacher, og allar tær kendastu ítróttastjørnurnar møta eisini upp fyri at taka ímóti heiðuri og hitta onnur kend ítróttafólk. Alt tiltakið verður hildið í Monako, og tað verður ikki spart við nøkrum. Ítróttafólk av hesum slag eru eisini von við tað besta av tí besta, og tað er eisini hetta, ið tey fáa í Monako. Endamálið við tiltakinum er eisini av savna saman pening til frama fyri ítrótt í niðurundirkomnum londum í Afrika. Hetta er triðja árið, at kappingin verður hildin, og hon verður stuðlað av fyritøkum sum Mercedez og aftanfyri kappingina standa eisini ein hópur av kendum ítróttafólki. Eins og við Oscar virðislønunum í filmi, so er tað eitt akademi, sum velur ímillum tey innstillaðu. Akademiið er mannað av eldri víðagitnum ítróttafólki.

Tað verða latnar sjey virðislønir: Fyri besta avrik hjá einum manni og einari kvinnu. Fyri besta lið, fyri ársins comeback, fyri besta »Newcomer«, fyri tann besta í alternativum ítróttagreinum og so Sportsperson with a disability, har føroyska Heidi Andreasen eisini var í uppskotið.

Allar virðislønar verða latnir fyri avrik í farna árinum, t.e. 2001.

Eftir olympisku leikirnar í 2000 í Avstralia skrivaðu tey frá ÍSB nøkur um Heidi, men tey havi ikki frætt nakað nærri síðani. Síðani hevur tann ovasta fyri svimjingina virkað fyri, at Heidi skuldi vera innstillað. Tað er serliga fyri hennara avrik í EM, har tað gjørdist til fleiri gullmerki og eitt heimsmet, at Heidi verður nevnd á heimasíðuni hjá Laureus.

–Tað var ein heiður bara at gerast innstillað. Tað var heilt fantastiskt og ein sigur í sær sjálvum. Eg varð als ikki skuffað, tá eg ikki vann, sigur Heidi Andreasen, sum sigur, at hon var bangin fyri, hvat hon skuldi siga og gera, um hon vann.

Vinnararnir í ár gjørdist so kend nøvn sum Goran Ivanisevic, Jennifer Capriati, Juan Pablo Montoya og so eisini Michael Schumacher.

Vinnarin í kappingini, har Heidi luttók, varð hálendska Esther Vergeer, sum spælir tennis í koyristóli. Tjúgu ára gamal Esther hevur seinasta árið verður at kalla einaráðandi innan tennis fyri fólk í koyristóli.

## Einki spart

Dagin eftir, at Heidi er komin aftur til landið, situr hon hinumegin borðið umringað av familju og venjara sínum, Katrin D. Johansen. Teir nógvu myndirnar skulu skoðast bæði væl og virðiliga, og tað er ikki sørt so nógv tey vita at fortelja frá túrinum. Við sær í Monako hevði Heidi Katrina og foreldrini, Niels Emil og Honnu Andreasen. Eisini vóru Bartal Kass frá Føroya Lívstrygging og Tórður Mikkelsen frá Sjónvarpi Føroya við á ferðini.

Túrurin gjørdist reint marglæti hjá Heidi og hennara. Tað er rættiliga týðuligt, at tey eru væl nøgd við túrin, og tað er heldur ikki so undarligt.

Túrurin hjá Heidi og hennara ferðalag var frá Sunnudegi til hósdag, tá tey aftur settu fótin á land í Føroyum. Á ferðini var í orðsins rætta týdningi fyrsta floks. Allan vegin vóru Heidi og Katrin vartaði upp á fyrsta klassa.

–Tað var alt sum ein dreymur. Tað hevur altíð verið mín dreymur at skulu uppliva sovorðið. Tað var heilt fantastiskt, sigur Heidi Andreasen við einum stóri smíli.

Í Monako sleppur nevniliga ikki hvør sum helst at búgva. Tú skalt eiga einar 750.000 kr. á bók fyri at sleppa at búgva har, og alt landið er fylt við ríkdómi. Skatt gjalda tey lítið av, og tað er vanligt, at múgvandi ítróttafólk og onnur flyta til Monako fyri at sleppa betur at njóta teirra pengar.

Meðan tær vóru staddir í Monako búðu tær, Heidi og Katrin, á Grand Hotel, sum telist millum stásiligastu gistingarhúsini i Monako. Í onkrari av fríløtunum vitjaði føroyska ferðalagið m.a. umborð einari snøggari yacht, ið tað íðir við í marinaini í Monako. Orsakað av, at Heidi er so ung, fekk hon loyvi til at tak Katrina við sær.

## Handan

Sunnukvøldið og Mánakvøldið varð skipað fyri tiltøkum fyri Heidi og hinar gestirnar. Mánakvøldið var stórur døgurði, har luttakaralistin innihelt ein heilan hóp av kendum films- og ítróttastjørnum.

Til øll tiltøkini var nógv gjørt fyri trygdina. Eingin slap inn uttan øll pappírini vóru í ordan. Til stóra døgurðan mánakvøldið var m.a. skipað fyri uppboðssølu, har múgvandi gestirnir kappaðust um at lata av teirra ríkidømi fyri ymsar lutir.

Tað heilt stóra kvøldið var týskvøldið. Talan var um eitt rættiligt galla kvøld, har teir fínaru kjólarnir skulu finnast fram.

Til endamálið hevði Heidi eisini fingið ein kjólan gjørdan til sín. Tóra Tórgarð og Trina Hansen, sum saman eiga fyritøkuna Design, høvdu gjørt Heidi ein vakran reyðan kjóla til kvøldið. Kjólin var m.a. skrýddur við yvir túsund smáum perlum, ið allar vóru hondseymaður.

Heidi sigur, at tað vóru fleiri, ið løgdu til merkis hennara kjóla og røstu honum.

Til handanin vóru ymisk kend fólk komin at handa tær ymsu virðisløninirnar.

–Vit vóru sett soleiðis, at tey kendastu sótu fremst, og tey gjørdust minni og minni kend longur afturi, siga tær báðar, Heidi og Katrin.

Tað gjørdist ikki Heidi, sum vann, men hetta gjørdist hon ikki skuffað yvir. Bert tiltakið var eitt ovurstórt upplivilsi.

Hetta kvøldið kundi Heidi og hennara ferðast millum tey kendastu kendu í ríkmannabýnum. Tey lata eisini væl at og siga, at øll vóru fryntlig og fyrikomandi.

Tey fingu eisini gjørt eitt sindur av reklamu fyri Føroyar, men tær halda, at tað kundi verið gjørt meira, tí nógv og týdningarmikil fólk vóru til staðar.

## Ikki hvíla

Hóast ein dreymur gjørdist veruleiki, og Heidi hevur nátt ein tind, iðhon kanska fær trupult at náða aftur, so er bæði hon og venjarin Katrin á einum máli um, at hetta er lítið av miklum.

–Hetta er næstan einki; eitt lítið stig á vegnum. Eg ætli mær nógv longur, tí nógv er enn at náða, sigur ein avgjørd Heidi Andreasen.

Hetta seinasta upplivilsið í Monako hevur – um nakað – givið henni blóð á tonni at halda áfram við at venja og støðugt gerast enn betri.

Venjarin Katrin er eins avgjørd og Heidi sjálv.

–Vit mugu ikki hvíla nú, sigur Katrin D. Johansen.

Næsti varðin á leiðin verður í desember, tá HM í Argentina er á skránni. Heidi Andreasen var fyri ikki so langari tíð síðani løgd undir skurð, og formurin er ikki tann besti í løtuni, men í summar bíða harðar og málrættaðar venjingar.

Til dagligt venur Heidi saman við hópinum í Havnar Svimjifelag. Nakrar ferðir um vikuna venur Katrin hana einsamalla, soleiðis at hon fær sum mest burturúr.

Tær báðar lata heilsa øllum fyri tann nógva stuðul, ið føroyingar hava latið teimum á nógvar mátar, m.a. við at velja Heidi á Internetinum.

Katrin vónar, at Heidi við hesum kann fáa meira stuðul, soleiðis at hon fær betri sømdir og møguleikar at venja. Við verandi arbeiðsskrá kann Heidi illa vinna sær pengar í frítíðini sum hennara javnaldrar, og tað krevur nógv av eiðisgentuni at so nógv og ofta.

26. mai verður verður ein sending í Sjónvarpi Føroya, ið Tórður Mikkelsen gjørdi, meðan hann var við Heidi og hinum í Monako.

Vit onnur kunnu fegnast um, at Heidi heldur áfram við at gera Føroyar og føroyska ítrótt kendari.



*–Hetta er næstan einki; eitt lítið stig á vegnum. Eg ætli mær nógv longur, tí nógv er enn at náða, sigur ein avgjørd Heidi Andreasen. Her er hon avmyndað við familjuni.*



*Monako er eitt land fyri tey ríku. Pinkulandi við 32.000 íbúgvum er fylt við luksus og ríkidømi.*